Landsstýrið hevur møguliga tulkað Noregssáttmálan skeivt:

Føroysk skip kunnu fiska óavmarkað innanfyri 4 fjórðingar við Svalbard

Territorialsjógvurin kring Svalabrd og eisini kring Bjarnoynna og Hopen — frá 0 út á 4 fjórðingar — er frítt øki at fiska í, uttan nakra sum helst avmarking. Ber tskulu skipini halda seg til vanligu reglugerðirnar um fiskiveiðu.

Hetta framgongur í norska tekstinum av teirri avtalu, sum er gjørd millum Noreg og Føroyar. Í norska tekstinum til avtaluna, sum er tann bindandi, stendur, at føroyska rækjuveiðan verður avmarkað í fiskiverjusonuni, sum er økið uttanfyri 4 fjórðingar, og sum so ikki umfatað av Svalbardtraktatini. Men í føroysku umsetingini, teirri, sum er løgd til grund fyri sáttmálanum fyri tingið og vinnuna, stendur, at talan er um alla fiskiveiði við Svalbard.

Árni Olafsson: — Hasa finessuna havi eg ikki hugsað um

Sosialurin hevur sett Árna Olafsson, skrivstovustjóra í landsstýrinum, sum luttók í samráðingunum við norðmenn, nakrar spurningar í samband við hesar samráðingar, har føroyingar gingu við at avmarka talið á rækjuskipum sum kunnu veiða við Svalbard.

Árni Olafsson sigur, at norðmenn kanna sær landgrunnin líka norður um Svalbard. Svalbard sum so hevur ongan landgrunn, men liggur á tí norska-landgrunninum.

Sambært Svalbardtraktatina hava londini, sum hava skrivað undir hesa traktat loyvi at bora eftir olju, at bróta kol og hvørt av sínum. Traktatin fevnir um allanSvalbardoyggjabólkin og sjálvt territorialøkið, sum er frá 0 út á 4 fjórðingar. Bjarnoyggin og Hopen eru eisini roknað uppí.

Norðmenn siga, at tað, sum liggur uttanfyri 4 fjórðingar er norskt búskaparligt øki, og her hava teir allan avgerðarrættin. Men hetta hava onnur lond ikki góðtikið. Tey siga, at tað er náttúrligt av teimum at halda, at økið millum 4 og 200 fjórðingar er frítt at fiska í. Hesi lond siga, at fiskarísonan (4—200 fjórðingar) er eitt framhald av territorialøkinum (0—4 fjórðingar). Tí vilja tey vera við, at somu rættindi og skyldur, sum eru galdandi inni á territorialøkinum eisini mugu vera galdandi í fiskarísonuni, tí hon er eitt framhald av tí fyrra.

Árni Olafsson sigur í hesum sambandi, at fleiri lond kunnu tulka eina traktat ymiskt, men í seinasta umfari er tað so altjóða dómstólurin í Haag, sum hevur síðsta orðið.

— Eg rokni við, at eitt sjónarmið sum hetta kann halda yvirfyri dómstólinum í Haag.

Jura og politikkur

— Men tað sjónarmiðið hava føroysku samráðingarmenninir so ikki havt — tit góvu jú norðmonnum viðhald við tað, at teir fingu inn í sáttmálan, at veiðuorka føroyinga við Svalbard skal skerjast.

— Nei, vit hava ikki góðtikið teirra sjónarmið um, at fiskiøkið við Svalbard er norskt. Her eigur ein at skilja millum jura og politikk. Vit hava hart og týðuliga sagt við norðmenn, at vit meta ikki, at teir hava nøkur krøv uppá svalbardøkið. Men nakað annað er, at teir siga, at um liður í einum góðum samarbeiði, so vilja teir hava tað við í avtaluni, at vit skulu fyrihalda okkum so ella so í svalbardøkinum.

— Eru dømi um líknandi aðrastaðni?

— Vit hava verið úti fyri paralellum taktikki frá canadiskari síðu. Teir hava sagt, at gera lond, sum fiska við m.a. Flemish Cap ikki so og so, fáa tey onga fiskariavtalu við Canada. Og hetta er møguliga ein av orsøkunum til, at vit framvegis hava eina slíka avtalu við Canada.

Norðmenn hava t.d. biðið spaniólar avmarka sína veiðu í Svalbardøkinum, men tað gingu spaniólar ikki við til. Tí er heldur eingin fiskariavtala millum hesi bæði londini.

EEC gjørt handil

Árni Olafsson vísir eisini á veiðuna hjá EEC-londum við Svalbard. Her hevur EEC sagt ja til at steðga síni lodnuveiðu við Svalbard sum eitt lið í einum politiskum handli, har báðir partar geva og taka.

— Eg kann leggja aftrat, at norðmenn leggja stóran dent á, at eru lond ikki samarbeiðshugað, so endar alt í anarki í fiskariverjusonuni við Svalbard.

Sjálvt um norðmenn føra fram sum sitt sjónarmið, at teir hava krav uppá eitt búskaparligt øki frá fýra fjórðingum og úteftir, so hava teir reint legalt ikki gjørt annað enn at seta eina fiskariverjusonu — og ein slík er í samsvar við Svalbardtraktatina. Hetta merkir, at norsk fiskarílóggáva er galdandi, men tó ikki á diskriminerandi støði.

— Nú er tað so, at eingi vísindalig prógv liggja fyri, at t.d. rækjustovnurin við Svalbard er hóttur. Hvussu kunnu norðmenn tá krevja avmarkingar?

— Sum sagt, norðmenn kunnu ikki diskriminera nakran sambært Svalbardavtaluna. Men teir **kunnu** t.d. seta eitt fyribils TAC. Hetta er hent aðrastaðni, har tað hevur verið eitt fiskarí, sum bráddliga er økt í stóran mun. Og hetta er ikki diskriminerandi.

Territorialøki og fiskariverjusona

— Fiskariverjusonan kring Svalbard, gongur hon ikki frá 4 og út á 200 fjórðingar?

— Formelt kann ein siga, at hon gongur frá territorialsjógvi og úteftir. Tað ger hon eisini í Føroyum.

— Sambært Svalbardtraktatina hava øll skip loyvi at fiska í territorialsjógvi!

— Ja, tað er heilt givið. Øll lond uttan Noreg vilja vera við, at sami rættur er galdandi bæði innanfyri og uttanfyri 4. fjórðingar.

— Men nú hava vit bundið okkum til avmarkingar uttanfyri 4 fjórðingar. Kunnu vit so eftir landsstýrisins tykki fiska óavmarkað innanfyri 4 fjórðingar?

— Nei, tann frivilluga bindingin, sum er gjørd í avtaluni við Noreg, má gjalda fyri alt Svalbardøkið, bæði territorialsjógv og fiskariverjusonuna.

— Er tað heilt vist?

— Nú havi eg ikki avtalutekstin hjá mær (Árni Olafsson var staddur á flogvøllinum í Vágum, tá Sosialurin ringdi, blaðm.).

— Í uppskotinum til avtaluna, sum er lagt fyri tingið stendur í føroyska tekstinum »føroyskt fiskiveiða við Svalbard«, meðan tað í norska tekstinum, protokollini, stendur »føroyska fiskiveiði í fiskariverjusonuni«. Er tað ikki so, at protokollin er tann bindandi?

— Protokollin er tann bindandi. Eg má annars viðganga, at hasa finessuna havi eg ikki hugsað um.

Ímóti andanum

— Men kann tá ikki eitt óavmakað tal av føroyskum skipum fara inn um 4 fjórðinga markið við Svalbard at veiða?

— Eg vildi í hvussu so er mett, at norðmenn høvdu góðar grundir at halda, at hetta var ímóti andanum í sáttmálanum. Meiningin við avmarkingini hevur heilt týðuliga verið øll øki, har tað kann fiskast við Svalbard. Men møguliga er eitt juridiskt glopp har. Eg dugi ikki at svara tí nú.

Men hetta hevur so ikki verið ætlanin. Vit hava uppfatað tað norska kravið, solieðis at tað í mesta lagi kunnu vera fimm skip við Svalbard samstundis uttan mun til um tað er inni í territorialsjógvi ella úti í fiskariverjusonuni. Soleiðis hava norðmenn givið eisini uppfatað tað.

— Nú hava føroyingar so skrivað undir uppá at avmarka seg við Svalbard. Men hava norðmenn eisini gjørt tað?

— Teir hava ikki givið nøkur ávís lyfti burtursæð frá, at teir hava sagt, at teir bera ótta fyri stovninum av rækjum. Teir hava jú konsessiónslóggávu fyri rækjutrolarar, og teir hava ikki viljað givið nýggja konsessiónir.

Teir hava upplýst, at teir í 1982 hava fiskað 5000 tons av rækjum við 6—7 skipum.

— Hvussu við teimum smærru bátunum, ið eisini fiska rækjur, verða teir als ikki roknaðir uppí norska rækjuflotan?

— Eg má viðganga, at eg eri ikki heilt visir í tí. Men



Territorialsjógvur og fiskiverjusona

— Føroyingar kunnu fiska innafyri 4. fjórðinga fiskimarkið við Svalbard uttan nakra ávísa avmarking. Sum eitt av londunum, sum hevur skrivað undir Svalbardtraktatina, hava Føroyar óskerdan rætt til fiskiríkidømi á hesum øki. Tó mugu vanligar fiskiveiðureglur haldast.

Hetta segði sýslumaðurin á Svalbard í eini samrøðu í sjónvarpinum sunnukvøldið. Hann vísti eisini á, at økið millum 4 og 200 fjórðingar verður av norðmonnum mett at vera norskt øki.

Sambært hetta úttalilsi frá sýslumanninum á Svalbard kunnu føroysk rækjuskip fiska rækjur uttan nakra skerjing innan fyri 4. fjórðinga markið við Svalbard. Uttanfyri hetta mark kunnu vit bert fiska við í mesta lagi 9 skipum og við 5 skipum samstundis. Henda avtalan er tó enn ikki góðkent av løgtinginum.

Sosialurin hevur kannað, hvat stendur í sáttmálanum, sum Noreg og Føroyar komu ásamt um í fjør. Í uppskotinum til samtyktar, um skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1983, sum er lagt fram í løgtinginum, stendur í føroyska tekstinum m.a., at føroyska rækjuveiðan **við Svalbard** (undirstrikingin er blaðmansins) skal avmarkast... Men í protokollini frá samráðingunum stendur »det færøske rejefiskeri i **fiskeværnsonen** ved Svalbard begrænses... (undirstrik. blaðm).

Og »Fiskeværnsonen« er frá 4 út á 200 fjórðingar.

Tvs. at føroysk skip nú aftaná, at nýggja avtalan millum Noreg og Føroyar er gjørd, kunnu fiska uttan nakra avmarking á økinum úr 0 og út á 4 fjórðingar kring Svalbard, men hava avmarkað seg millum 4 og 200 fjórðingar.

jan